# Mær dámar væl lívsstílin

**Meg Mulloy hevur ferðast nógv, men hevði ikki hoyrt nakað serligt um Føroyar, áðrenn hon hitti føroying á myndaskúla í St. Barbara í Kalifornia. Nú hevur hon so upplivað land okkara í ódn og sól**



*Amerikanska myndakvinnan lat væl at veðrinum teir fyrstu dagarnar, men í gjár upplivdi hon eisini, hvussu illfýsið føroyska veðurlagið kann vera*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Ferðafólk



**Leo Poulsen**
leo@sosialurin.fo

Í summar hevur Suneva Lassen verið frítíðaravloysari á Sosialinum. Hon er júst útlærd myndakvinna frá myndaskúlanum í St. Barbara í Kalifornia í USA.

Har á skúlanum hitti hon eina amerikanska kvinnu, og tær gjørdust skjótt vinkonur. Og nú hevur hendan vinkonan, Margreth "Meg" Mulloy verið og vitjað í Føroyum.

Sum við so mongum øðrum útlendingum, sum vitja í landinum, er eisini Meg hugtikin av Føroyum, bæði náttúru og fólki.

- Tað, sum eg haldi vera serliga spennandi, er arkitekturin. Hann hugtekur meg veruliga, sigur Meg Mulloy.

Men eisini fornminnir og gamlir lutir hevur hennara áhuga.

- Nógvir av bygningunum hjá tykkum eru fleiri hundrað ár eldri enn mítt land, sigur hon og sipar sjálvandi til, at Amerika ikki varð bygt av hvíta manninum fyrr enn fyri einum 400 árum síðani.

Hon var rættiliga heppin í veðrinum fyrstu dagarnar, tá heystardagurin vísti seg frá sínari bestu síðu. Men hann vísti seg eisini frá einari meiri illfýsnari síðu, serliga í gjár, við bæði vindi og regni.

### Úr høvuðsstaðnum

Meg Mulloy stavar upprunaliga úr Írlandi, men sum so mangar aðrar írskar familjur valdu eisini forfedrar hennara at flyta yvir um hav til tað, sum tey vónaðu fór at gerast ein betri lagna.

Foreldrini búgva í útjaðaranum av Washington DC, og pápin arbeiðir hjá tí almenna í høvuðsstaðnum.

Sjálvur Washington DC er ein arbeiðsbýur skilt á tann hátt, at hóast nógv fólk starvast har, serliga í amerikansku stjórnini, so býr lítið av fólki í býnum.

Sjálvur býurin liggur eisini á markinum millum tveir statir, Maryland fyri norðan og Virginia fyri sunnan. Tað er í sunnara partinum, at Meg og foreldur hennara búgva.

Tað vil kortini siga, at seinastu árini, meðan Meg Mulloy hevur gingið í myndaskúla, hevur hon búleikast í heitari umhvørvi, nevniliga í St. Barbara í Kalifornia. Hetta er ikki stórur býur eftir amerikanskum mátistokki, eini 100.000 fólk. Men klimaið er sum nevnt gott.

Meg Mulloy hevur annars ferðast rímiliga nógv og hevur eitt nú verið í bæði Íslandi og Danmark. Men hóast tað, hevði hon so at siga einki hoyrt um Føroyar, áðrenn hon hitti føroyskan skúlafelaga í St. Barbara.

### Í Ísrael

Amerikanska kvinnan er liðug við sjálva skúlagongdina, men manglar enn at gera høvuðsuppgávu sína lidna. Og meðan hon ger hana, arbeiðir hon fyri lívsins uppihald samstundis.

Hon tekur myndir fyri eina fyritøku, sum selir klæðir og klæðnapløgg um alnetið, og tað er uppgávan hjá Meg Mulloy at taka myndir av hesum, sum síðani verða lagdar út á netið.

Professionelt fylgir hon tøkniligu menningin, men til egið brúk nýtir hon enn gomlu góðu filmsrullirnar.

Sum myndafólk sigur tað seg næstan sjálvt, at tá tú ferðast í fremmandum umhvørvi, so verður ikki spart upp á myndirnar. Hetta var sjálvandi eisini so hjá Meg Mulloy í Føroyum, eins og tað er aðrastaðni, har hon kemur. Og á veg til Føroya – um ein so kann siga – var hon í Ísrael.

Hetta var ein ferð fyriskipað av kirkjuni, hon er limur í. Hendan kirkjan skipar fyri ferðum til Ísraels við hálvumøðrum ára millumbili, og nú var tíðin so komin aftur til slíka ferð.

Meg Mulloy heldur, at fólkið í Ísrael er ógvuliga patriotistk og stendur væl saman. Men hinvegin helt hon eisini, at tað virkaði ógvuliga friðarligt í landinum, hóast harðar samanbrestir fyrr í ár við palestinar.

### Dámar fótbólt

Úr Ísrael gekk leiðin so til Føroya at vitja Sunevu Lassen, sum fyri mánað síðani varð liðug við útbúgving sína sum lýsingar myndakvinna. Og sum nevnt omanfyri, hevur Meg Mulloy dámað sera væl á okkara veðurbardu klettum. Men eitt er hon eitt sindur hørm um, at hon ikki náddi, meðan hon var í landinum.

- Eg kundi so væl hugsað mær at verið til ein fótbóltsdyst. Men tað eydnaðist tíverri ikki. Tað má eg so eiga til góða, sigur hon.

Hon var annars og vitjaði Mikkjal Thomasen og frú, men ólukkutíð var hann leikbannaður um vikuskiftið.

- Annars høvdu vit nokk verið og hugt, heldur Meg Mulloy.

Tað er ikki so heilt vanligt, at amerikanarar eru áhugaðir í fótbólti – ella sum teir nevna tað, soccer. Men Meg Mulloy er. Amerikanskur fótbóltur er ikki akkurát hon, og basketball tímir hon illa at hyggja at.

- Baseball er fínt, tá ein er á stadion til dystirnar, men ikki at síggja í sjónvarpi. Tá er fótbóltur nakað heilt annað. Og hann er á veg uppeftir í USA, ikki minst eftir, at David Beckham er komin til LA Galaxy at spæla, sigur Meg Mulloy.

Hon fer av landinum aftur í dag eftir góða viku í Føroyum. Men hon fer avstað aftur við einum góðum intrykki av Føroyum og føroyingum.